



# HIN ØLL DUGA

## EIN UPPSKRIFT, ÓENDALIGIR MØGULEIKAR

Stødd uml. 3-4 ár
Longd uml. 38-40 cm
Stokkar 4,5 mm og 5 mm
Uml 200 til 250 gr – trýtráðað Snældu tógv
Binditíttleiki 10x10 cm 19 eygu 26 umfør

Av tí at tað eru ymiskri háttir at binda troyggjuna uppá, verður nælt til at lesa alla uppskriftina, áðrenn byrjað verður.

Um perlumynsturi skal í, sí diagram 1.
Skal troyggjan verða opin, kasta so eitt eyga eyka uppá = 57 eygu.
Síðst í uppskriftini stendur hvussu kantarnir v/ knappholi skulu bindast.
Ranglanið kann bindast við ella uttan holmynstur. Um flesi skal í so skal hetta gerast í 12. umfari av ranglaninum. Sí diagram 2.

Troyggjan verur bundin frá hálsinum og niður.
Rondin verur bundin 1 rætt og 1 rangt.

**Grundmynstur**: Kasta 56 eygu á rundstokk nummar 4,5 mm, kasta leyst uppá, so hálsurin ikki verður ov strammur. Bind 10 umfør rond, 1 rætt og 1 rangt.
Skift síðan til stokk nummar 5 og bind eitt umfar rætt. Síðan verður tikið uppá til ranglan: *kasta um, bind 7 eygu, kasta um, bind eitt eyga (ranglaneyga), kasta um, bind 19 eygu, kasta um, bind eitt eyga (ranglaneyga) *. Bind frá * til * enn eina ferð. Set eitt merki í aftaná seinasta ranglaneyga, umfarið byrjar her. Sí forkláring niðanfyri vanligt ranglan/holumynstur ranglan, fyri at lesa hvussu hetta kann bindast.
Skift til rundstokk 60 cm, tá nokk av eygum eru á. Taka uppá í alt 17 ferðir til ranglan = 192 eygu á stokkinum. Síðan verur deilt upp til bul og ermar.

**OBS!** Um ein ætlar at binda flesa ella mynstur í, so verur byrja uppá hetta tá ein hevur tikið uppá 12 ferðir í ranglaninum. Bind rang eygu eftir diagram 1 ella 2.

**Ermar:** Kasta 4 eygu á stokk nr. 5, og byrja síðan við at binda ranglaneygað og yvir til næsta ranglaneyga = 47 eygu. Bind nú runt til erman er 27 cm long (ella til ynsktu longd). Tak samstundis

av 10. hvørt umfari, í alt 6 ferðir = 35 eygu Tá erman er ynsktu longd, skiftir tú til stokk 4,5 og bindur eitt umfar rætt, har tú bindur einaferð tvey eygu saman = 34 eygu. Bind nú 10. umfør rond, 1 rætt og 1 rangt. Tak síðani leyst av.
Ger nú tað sama á hini síðuni og bind eina ermu afturat.

**Bulur:** Nú er klárt at seta restina av eygunum á ein rundstokk nr 5 mm. Tak nú 4 eygu eyka á stokkin undir hvørjum armi, við at binda í tey eyguni tú hevur tikið uppá undir ermuni = 114 eygu.
Set eitt merki í aftaná fyrstu 2 eyguni (sum júst eru tikin uppá), umfarið byrjar her.
Bind bulin beint niður til hann er 20 cm langur, skift síðan til stokk nr 4,5 mm og bind 10 umfør rond, tak síðani leyst av.

**Vanligt ranglan:** Bind 1. stokk soleiðis - *kasta um, bind 7 eygu, kasta um, bind eitt eyga (ranglaneyga), kasta um, bind 19 eygu, kasta um, bind eitt eyga (ranglaneyga)*. Bind frá * til * enn eina ferð.
Bind næsta stokk soleiðis - nú bindur tú tey eyguni ið eru tikin uppá, snúrað rætt. Bindur tú troyggjuna opna, so skal næsti stokkur bindast rangt og eyguni, ið eru tikin uppá skulu bindast snúraði rangt.

**Holumynstur ranglan:** Bind fyrsta stokk soleiðis - *kasta um, bind 7 eygu, kasta um, bind eitt eyga (ranglaneyga), kasta um, bind 19 eygu, kasta um, bind eitt eyga (ranglaneyga)*. Bind frá * til * enn eina ferð.
Bind næsta stokk soleiðis – bind stokkin rætt, eisini tey eyguni, ið eru tikin uppá. Bindur tú troyggjuna opna, so skal næsti stokkur bindast rangt og tey eygu, ið eru tikin uppá skulu eisini bindast rangt.

**Fles:** Tak eitt eyga upp í hvørt ranga eyga byrja aftanfyri. Tak í hvørt ranga eyga = 152 eygu. Á næsta stokki verur hvørt eyga síðani bundi til tvey eygu, við at binda í framman og aftan á sama eyga. Ger hetta allan stokkin út = 304 eygu. Bind 8-10 umfør, bind eitt umfar rangt og tak síðani rætt av.

**Rond til opna troyggju:** Tak nú eygu upp eftir kantinum vinstrumegin við stokki 4,5 mm. Tak trý eygu upp (1 eyga í hvørt umfar) og loyp síðan tað fjórða umfarið um, ger hetta allanvegin upp = uml. 78 eygu.
Bind síðan fimm umfør og tak leysliga av á sætta umfari, her er umráðandi at ikki stramma.
Nú skal høgra síða gerast og verður gjørd líka sum vinstra síða, tó skal bindast knappahol í 3. umfari. Í alt fimm knappahol. (um troyggjan er til drong, verður høgra síða gjørd fyrst - knappholini skulu verða vinstrumegin)
Knappahol = slá um og bind tvey eygu saman.



Diagram 1




Diagram 2

